# Kjak



Halgir Winther Poulsen

## Spillir navnið ongan?

Tá løgtingið í 1905 skrivaði til Landmandsbankan í Keypmannahavn við áheitan um at seta banka á stovn í Føroyum, svaraði bankin, at tað høvdu teir hug at gera. Teir vildu seta á stovn banka við navninum "Færøernes Bank" og við einum partapeningi uppá 300,000 kr, og soleiðis at føroyingar fingu høvi til næstu fimm árini at tekna partapening. Um navnið varð semja um, at tað skuldi vera færoyskt, og um hetta tekur ein løgtingsmaður soleiðis til: "..nu står vi overfor en selvstændig færøsk bank med færøsk navn, mod hvilket jeg kun har at indvende, at der vistnok mangler et "i": "Føroya banki" i stedet for som foreslået "Føroya bank". Hesum navni hevur bankin stríðst undir í góðum og ringum tíðum, hóast stórur meiriluti av partapeninginum var á donskum hondum, og navnið hevur neyvan verið okkara flaggskipi innan fíggjarheimin í meira enn hundrað ár at bága.

Men nú er vent í holini. Nú hava teir keypt bankafilialir í Jútlandi og øðrum donskum landspørtum og enntá í Grønlandi. Tá hesi fólk ikki duga at siga "Føroya banki", skal navnið broytast til nakað so fjákut sum "BankNordik", sum hvørki er fuglur ella fiskur, hvørki føroyskt, danskt, grønlendskt ella tað vælsignaða enska, sum alt annars skal eita í Føroyum, sum hevur virðing fyri sær sjálvum. Men hvar er virðingin fyri okkum føroyingum, sum hesi væl hundraðárini hava gjørt okkara til, at bankin enn livir sítt fríska lív, hóast nøkur bakkøst á vegnum.

Eg fari at loyva mær at minna á, at tá báðir bankarnir vórðu samanlagdir og endurreistir við almennum (les okkara skattaborgaranna) pengum, og tað var Sjóvinnubankin, ið var tann, ið helt fram, var stór semja um, at hóast hetta mátti navnið á samanlagda bankanum vera "Føroya banki", tí tað var okkara almenna andlit, bæði innan- og uttanlands. Tá bankin fyri nøkrum árum síðan var á veg út um landoddarnar, gjørdu teir nógv burturúr, at teir høvdu strikað skrástrikuna í "ø"num, tí tað skuldi vera meira "internationalt". Her kundi verið mint á, at hundraðtals føroyingar hava gjøgnum árini havt góða útkoma av at sigla við skipunum hjá danska reiðarínum, sum hóast eitt minst líka "óinternationalt" "æ" í navninum er vorðið eitt av heimsins størstu reiðaríum.

Eg fari við hesum at heita á allar føroyingar, sama um teir eru kundar í bankanum ella ikki, at mótmæla harðliga móti hesum fjantinum og krevja, at bankin broytir hesa avgerð beinanvegin og fer aftur til góða gamla navnið "Føroya banki". Hetta kann gerast við at senda bankanun teldupostar á info@banknordik.fo ella foroya@foroya.fo ella stovna ein mótmælisbólk á Facebook.



Bjarti Thomsen
*Nólsoy*

## Fiskiloyvi við tvungnari uppsparing

So varð bardagin um fiskidagar av á hesum sinni, og eftir svimur ein toskastovnur, sum hevur ongan livandi kjans. Verður toskurin ikki tikin sum pinkalítið yngul av makreli ella øðrum rovfiski, so verður hann tikin sum toskamurtur ella millumfiskur av teimum nógvu milliónum húkum, sum verða ringdir niður á landgrunnin hvørt ár. Hvussu nógvir húkarnir eru vita vit ikki neyvt, tí tað verður ikki skrásett. Tað, sum húkurin ikki fær fatur á, tekur trolið sær av nakað seinni. Toskurin er virðismiklari enn hýsa og upsi, og verður tí tikin, so hvørt nakað er at fáa.

Síðan fiskidagaskipanin byrjaði, er umleið triðji hvør dagur tikin burtur. Talið av fiskiførum er tó ikki minkað tilsvarandi. Skipini hava sostatt færri og færri dagar í part og flestu sigla við undirskoti. Orsøkin er, at reiðarar hveppa seg við at taka skipini úr flotanum, tí teir halda, at fiskiloyvið í sjálvum sær hevur stórt virði, hóast dagatalið er minkandi. Hetta eru tey ódeyðuligu fiskiloyvini, sum Heini í Kunoy plagar at taka til. Brúk er fyri eini skipan, so skipatalið kann minkað, so hvørt sum fiskidagarnir fækka.

Eitt hugskot kundi verið, at skipaeigarar gjalda inn eina tvungna uppsparing hvørt ár, í samband við at teir fáa fiskiloyvi útskrivað. Upphæddin kundi verið tengd at virðinum á skipinum ella at veiðuni seinasta árið. Uppsparingin skuldi so verið útgoldin, tá skipið fór úr flotanum. Umframt hetta afturgjald kann skipaeigarin selja sjálvt skipið og teir fiskidagar hann hevur eftir. Hetta hevði gjørt tað meira hugaligt at tikið skip úr flotanum, so fleiri fiskidagar vóru í part til restina av flotanum.

Hetta var bert eitt hugskot og íkast til kjakið, um hvussu fiskidagaskipanin kann gerast enn betri.



Óli Mikkelsen
*lækni*

## Sjúkrahúsverkið á vandakós

Fyri góðari viku síðani hevði eg lesarabræv (Dimma. 30.august) har eg, aftaná at hava lisið greinir frá Tóru við Keldu, Jákup Mikkelsen og Jákup Petersen, gjørdi vart við at sjúkrahússtjórin var lagdur undir stórt trýst frá klaksvíksgingum og at uppsøgnin av sjúkrahússtjóranum á Landssjúkrahúsinum var ein skarnsgerð.

Síðani er annar partur av greinini hjá Jákup Petersen komin (Dimma. 30. august). Tónin er tann sami. Hálovan av Klaksvíkar Sjúkrahúsi og klikkjan niður á Landssjúkrahúsið; men nú legst afturat at Landssjúkrahúsið er sjúkrahús í Havn, sum allir føroyingar uttanfyri Havnina – hvørt einasta húski í Norðuroyggjum, Eysturoy, Norðurstreymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy – eru við at hokna undir av at gjalda til hetta sjúkrahús.

Allan Skaalum er nú gjørdur til besta sjúkrahússtjóra nakrantíð; men eftir er at koyra restina av leiðsluni frá.

Ikki óvantað kemur Jógvan við Keldu við ískoytinum: Ov nógvir politikkarar hildu undan í sjúkrahúsmálinum (Dimma. 2. septembur).

Jógvan nevnir Centralsjúkrahús. Hesi vóru nógv umrødd, tá Jógvan sat í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús, fyri 30 árum síðani. Centralsjúkrahús í Danmark skuldu hava upptøkuøki við 200.000 fólkum í minsta lagi og útgerast við so nógvum serdeildum sum til bar. At vit við minni enn 50.000 íbúgvum ikki høvdu grundarlag fyri fult útbygdum Centralsjúkrahúsi, vóru vit sjálvandi samdir um, men so brast. Jógvan metti at tí mátti Klaksvíkar Sjúkrahús útbyggjast við serdeildum. Mín niðurstøða var at umráðandi var at hava serdeildirnar á einum sjúkrahúsi, so tað líktist Centralsjúkrahúsi sum frægast.

Síðani er nógv broytt. Í Danmark verður arbeitt við nógv størri eindum – Regiónum – og serdeildir fyri sjaldsamar sjúkur verða lagdar á tveimum ella einum stað.

Jógvan við Keldu veit væl, at var Klaksvíkar Sjúkrahús onkustaðni í Danmark, var tað langt síðani niðurlagt.

Tónin hjá Jógvani er annars sum hjá hinum: Niðurgerð av Landssjúkrahúsinum og hálovan av Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Tá fýra klaksvíksgingar koma hvør aftan á annan við niðurgerð av Landssjúkrahúsinum, ballað inn í hálovan og skamrósan av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, má niðurstøðan vera at heilsumálaráðharrin skal gerast til Klaksvíksging og øll tann politiska skipanin verður løgd undir trýst.

Við ongum sjúkrahúspolitikki er sjúkrahúsuverkið givið upp fyri skutil, skutilin er á lofti og skutlað verður fyri at fáa burtur av Landssjúkrahúsinum.

At hvørt húski uttanfyri Havnina í hesum samanhangi verður sett upp móti Havnini, ger støðuna uppaftur illgrunasamari.

Vit byggja ikki land á hesum grundarlagi – tvørturímóti – hava vit veruliga ov nógvar politikkarar sum halda undan í sjúkrahúsmálinum.